P/F Stranda Máling fjøltáttar framleiðsluna:

# Fer at framleiða pappírsvørur

**- Vit hava keypt maskinur, sum eru settar upp á virkinum og fara nú eisini at framleiða wc-pappír, køkspappír og pappírshandklæði, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum er annar stjórin á P/F Stranda Máling**

FRAMLEIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Stranda Máling vil nú hava fleiri bein at standa á. Tá ið summarið fer at nærkast, fer virkið so smátt undir at framleiða wc-pappír, køkspappír og seinni eisini pappírshandklæði.

- Vit hava ikki tikið hetta stigið, tí virkið er illa fyri fíggjarliga - ella tí, at vit hava ásannað, at tíðin við føroyskari máling er farin. Vit hava góð hølir, sum eru tøk, og vit hava avlopstíð, og tí halda vit, at hetta er ein góður møguleiki til tess at fáa virkinum fleiri bein at standa á, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum saman við Eivindi Jacobsen, eru høvuðsmenninir aftan fyri P/F Stranda Máling.

Felagið hevur keypt maskinurnar til framleiðslu av wc-pappíri og køkspappíri, sum upprunaliga stóðu á Viðareiði. Hesar eru keyptar fyri tveimum mánaðum síðan og eru síðan settar upp í bygninginum hjá P/F Stranda Máling.



*- Vit høvdu hølini tøk, sum vit kundu hugsað okkum at brúkt betur – og vit hava avlopstíð, nú málingavirkið er so nógv automatiserað. Somuleiðis kundu vit hugsað okkum at havt fleiri bein at standa á. Tí hava vit avgjørt eisini at fara undir framleiðslu av pappírsvørum, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk*

### Praktiskir trupulleikar

– Vit hava keypt maskinurnar frá Blika í Havn, sum hevur átt tær seinastu árini. Eg haldi, at framleiðslan hjá Blika steðgaði um ta tíðina, verkfallið var á arbeiðsmarknaðinum fyri tveimum árum síðan. Nakað av vørulagri hevur verið á goymslu, sum er selt síðan, men eg haldi ikki, at nøkur serlig framleiðsla hevur verið av pappírsvørunum seinastu tvey árini.

Jógvan Óli vísir á, at tað serliga vóru praktiskir trupulleikar sum gjørdu, at Blika gavst við framleiðsluni av pappírsvørum.

- Sum eg havi skilt, var virksemið hjá Blika ikki í egnum hølum, og somuleiðis noyddust tey at flyta fólk ímillum. Annars gekk framleiðslan hjá felagnum væl, sigur hann.

Stjórin sigur, at talan er um tríggjar høvuðseindir av maskinum, sum nú eru settar upp í hølunum hjá P/F Stranda Máling.

- Eg haldi, at hetta eru góðar maskinur, hóast tær ikki eru nýggjar. Hetta eru maskinur sum bara koyra. Tær kunn samanberast við eina gamla Harley Davidson, sum hann tekur til.

Jógvan Óli sigur, at slíkar maskinur eru dýrar at keypa í dag, men í hesum førinum er íløgan ikki so stór, tí maskinurnar eru keyptar bíliga.

### Bein at standa á

- Vit høvdu hølini tøk, sum vit kundu hugsað okkum at brúkt betur – og vit hava avlopstíð, nú sjálvt málingavirkið er so nógv automatiserað. Somuleiðis kundu vit hugsað okkum at havt fleiri bein at standa á. Tí hava vit avgjørt eisini at fara undir framleiðslu av pappírsvørum.

Hann sigur, at ætlanin er at fara varliga í gongd.

- Vit fara at byrja spakuliga í summar, soleiðis at vit kunnu læra maskinurnar og útbúnaðin annars at kenna – og tá ið heystið kemur, er ætlanin at seta meira ferð á. Síðan vænta vit, at framleiðslan fer at koyra, sum hann tekur til.

Jógvan Óli sigur, at teir eru sera spentir upp á nýggju framleiðsluna.

- Tað er soleiðis, at maskinan, sum kemur at framleiða pappírshandklæði, væntandi kemur í gongd nakað seinni enn hinar. Hetta er ein nýggjari og meira sjálvvirkandi maskina, sum eisini var við í keypinum.

Hann vísir á, at talan verður um tilsamans fleiri dygdir av pappírsvørum sum er neyðugt fyri at nøkta eftirspurningin.

- Væntandi er, at summi av sløgunum fara at geva lítlan vinning og onnur meira, men samanumtikið vænta vit, at henda framleiðsla fer at geva eitt íkast til virkið, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk at enda.

# Málingavirkið á Strondum er væl fyri

**Tað var strandingurin, Jóhan Thorleifsson, sáli, sum legði lunnar undir málingavirkið á Strondum. – Eg haldi, vit kunnu siga, at hetta var hansara lívsverk, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk**

STRENDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Jóhan Thorleifsson, sáli, sum í 1975 fór undir at framleiða máling á Strondum, og í 1996 keyptu Jógvan Óli á Fríðriksmørk og Eivind Jacobsen virkið.

- Eg haldi, vit kunnu siga, at tað var Jóhan Thorleifsson, sum legði grundarlagið undir tað virkið, sum vit hava í dag. Hetta var hansara lívsverk, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk um mannin, sum doyði herfyri.

Jóhan Thorleifsson var strandingur, men búði í Havn í nógv ár. Hann var ógiftur maður, var skipsføraralærdur og hevði siglt nógv úti.



*Stranda Máling byrjaði í 1975. Øll árini síðan hevur virkið framleitt máling. Í dag er virkið so rationelt, at bert trý fólk taka sær av allari framleiðsluni á virkinum*

### Eingin steðgur

Jógvan Óli vísir á, at P/F Máling er væl fyri í dag, og øll árini síðan 1975 hevur virkið framleitt máling.

- Jú, eg vil siga, at virkið er væl fyri, og soliditeturin er góður.

Stjórin sigur, at málingavirkið á Strondum er ikki, sum so nógv annað í samfelagnum, farið á húsagang, og virkið er ongantíð sanerað.

- Við árunum er virkið vorðið útbygt, og framleiðslan av máling er rationaliserað, soleiðis at brúk er ikki fyri so nógvum fólki sum áður, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk.

Á málingavirkinum á Strondum arbeiða trý fólk.

## Nýggj standmynd avdúkast

**Havn:** Hósdagin 28. apríl verður standmyndin "Veðrur" avdúkað uttan fyri Smiðjuna í Lítluvík.

Standmyndin, ið er stoypt í bronsu á Kulturstøberiet Løvholmen í Svendborg, hevur havnarmaðurin, Rógvi Hansen gjørt.

Eitt slíkt tiltak fer ikki aftur við borðinum uttan at verða markerað, og tí hevur býráðið sett upp eina skrá fyri henda seinnapartin, tá standmyndin skal avdúkast.

Á hesi samkomuni fer Havnar Ungdómshornorkestur at spæla, áðrenn borgarstjórin, Heðin Mortensen bjóðar vælkomin. Hildur Eyðunsdóttir, ið er forkvinna í mentamálanevndini fer síðani at flyta fram røðu, áðrenn standmyndin verður avdúkað av Heðini Mortensen.

Eftir hetta spælir Havnar Ungdómshornorkestur aftur, og síðani verður boðið til kaffi í Smiðjuni í Lítluvík.

**sb.**

## Ókeypis blað eina ferð um vikuna

Blaðið Dimmalætting er nú farið undir eitt nýtt átak, við at geva út eitt blað ókeypis eina ferð um vikuna. Hetta átakið byrjaði við útgávuni í gjár.

Hereftir fer týsdagsblaðið at verða borið út í hvørt hús, í fyrsta umfari bert til húsarhaldini í økinum, har bløðini frammanundan verða borðin út. Men arbeitt verður við at útbyggja týskvøldsútberingina, soleiðis at eisini Suðuroyggin og Sandoyggin koma við sum skjótast.

Orsøkin til hetta stigið er, at Prentmiðstøðin, sum stendur fyri prentingini og útberingini av Dimmalætting og Sosialinum, nú eisini fer undir reklamuútbering til øll húsarhald týskvøld.

Í samband við, at týskvøldsblaðið nú verður ókeypis, lækkar haldaragjaldið nakað. Haldararnir av bløðunum uttan fyri útberingarøkið, fáa tó bløðini borin til dyrnar sum vanligt við postinum dagin eftir.

**sb.**